

## Ragnar aftur í kvøld

Í kvøld klokkan 19.00 verður Talent 2008 víst á DR1. Ungi havnardrongur Ragnar Finnson luttekur aftur í kvøld, tá dómararnir skulu sálda meira enn helvtina av teimum, ið sluppu víðari úr upptøkuroyndunum í Talent. Spennandi verður um Ragnar nú megnar at koma í semifinalurnar, ið verða sendar frá næstu viku. Enn veit ongin hvønn sang Ragnar framførir í kvøld, men hann fer helst at syngja og leika á gittara einaferð enn.

# Skúvoyingar fáa koppingarevni við tyrlu

**Tað fall Harry Jensen, bónda í Skúvoy, fyri bróstið, tá apoteksverkið vildi hava hann at heinta koppingarevni móti garnasótt á Tjaldurs Apoteki. Nú vildu tey ikki senda heilivágin við postinum longur, og tað hevði merkt, at bóndin noyddist at liggja nátt í Havn fyri at fáa hendur á hesum. Men partarnir funnu eina góða flutningsloysn**

SKÚVOY
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyri at tryggja, at allur seyður í Føroyum verður koppsettur móti garnasótt, hevur apoteksverkið á hvørjum ári sent út koppingarevni til ymisku hagapartarnar kring landið.

Harry Jensen, bóndi í Skúvoy, sigur, at so vítt, sum hann veit, er hetta einasti heilivágur til seyð, sum kemur av sær sjálvum á hvørjum heysti.

- Okkum nýtist ikki at bíleggja koppingarevni móti garnasótt, tí hetta er ein føst og afturvendandi bílegging um heystarnar fyri at halda sóttini burtur.

Onnur heyst hevur tað verið soleiðis, at apotekið hevur sent koppingarevnið móti garnasótt út á bygdirnar í postsekki, men í heyst er mannagongdin broytt.

- Í ár fingu vit at vita, at koppingarevnið skal avheintast á Tjaldurs Apoteki eitt mikukvøld millum klokkan 18 og 20. Orsøkin er, sigur apoteksverkið, at koppingarevnið, sum í hesum førinum kemur úr Íslandi, bert heldur sær í stutta tíð. Tí kann apotekið ikki taka ábyrgdina av, at koppingarevnið kanska er oyðilagt, tá tað skal brúkast.

### Góð loysn

Harry sigur, at hann togaðist eina stund við apotekið um hesa broyttu mannagongd.

- Skuldi eg sjálvur til Havnar eftir koppingarevninum, sum skuldi avheintast millum kl. 18 og 20, hevði eg verið noyddur at ligið nátt í Havn, og tá hevði koppingarevnið ikki verið nýggjari enn tað sama, tá tað kom til Skúvoyar.

Bóndin í Skúvoy sigur, at tey á Tjalduts Apoteki vóru góð og forstáilig at tosa við, og tá samanum kom funnu tey eina heilt aðra loysn – nevniliga, at senda koppingarevnið til Skúvoyar við tyrlu.

- Í byrjanini var eg eitt sindur irriteraður, men vit fingu loyst hetta mál um flutningin á ein skilagóðan hátt og í góðum samstarvi. Kanska kunnu aðrir bøndur á útoyggj fáa somu loysn við apoteksverkið um flutning av koppingarevni, sum vit hava fingið, sigur Harry Jensen.

Sum bóndin í Skúvoy hevur skilt, er varhugi um, at allir bøndir kanska ikki goyma heilivágin líka væl, og verður hann ikki goymdur eftir forskriftunum, er lítil meining í at koppseta.

- Fyri at apoteksverkið kann hava reinan rygg, sum hann tekur til, vilja tey hava brúkararnar sjálvar at koma eftir heiliváginum, og tað skilji eg væl, sigur hann.

### Matur og heilivágur

Harry Jensen sigur, at tað eru bara sleppingarlombini ella gimburlombini, sum verða koppsett móti garnasótt, og hetta verður bara gjørt einaferð.

- Koppsetingin varar so fyri lívið, leggur hann aftrat.

Hann vísir á, at garnasótt er sjúka, sum mennist yvir longri tíð, og tí verða eitt nú brundar ikki sproytaðir.

- Teir verða nevniliga dripnir, áðrenn vandi er fyri, at teir gerast sjúkir. Tað er ærsseyðurin, sum í fyrsta lagi fær heilivágin. Hornaseyðurin er tann, sum fyrst og fremst verður etin, sigur Harry Jensen.

Bóndin í Skúvoy heldur tað vera gott, at hornaseyður ikki verður koppsettur, tí sum hann tekur til, so fær seyður longu eina rúgvu av heilivági frammanundan.

# Mjólk av út

**Tað eru eftirhondini nógv ár, síðan bøndur á útoyggj mistu møguleikan at framleiða mjólk inn á meginlandið. Við vælskipaðum flutningi í mjólkabili fóru tey gomlu mjólkablikkini í søguna og harvið eisini mjólkaframleiðslan á útoyggj. Men aftrat seyðinum, fóru bøndur í staðin at fáa sær ungneyt til sláturs, og soleiðis hevur Harry Jensen, bóndi, eisini gjørt á garði sínum í Skúvoy**



SKÚVOY
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Festið hjá Harry Jensen í Skúvoy er níggju merkur, og so eigur hann eisini nakað av ognarjørð. Men Harry er ikki einasti stóri bóndi í oynni. Eitt annað festið er eisini, sum er rímiliga stórt og telir átta merkur. Haraftrat er aðrir menn, sum eiga jørð og seyð í oynni.

Skúvoy ber einar 1000-1100 seyðir í gomlu vetrarskipanini, men um heystið, tá lombini eru við, er talið sjálvandi nógv størri.

### Kjøt selir væl

- Eg havi einar 220 seyðir umframt sjey kálvar til sláturs. Hetta er fyrsta árið, eg havi kálvar, men næsta ár hava vit 10. Ungneytini eru umleið hálvt annað ára gomul, tá tey verða dripin, sigur Harry Jensen.

Tað gongur væl at selja føroyskt kjøt, bæði seyðaog neytakjøt, og bóndin í Skúvoy heldur, at føroyingum dámar væl ungneytakjøt, sum hann tekur til.

- Tað fæst so lítið av føroyskum kjøti til keyps, og tí verður alt umbiðið so hvørt. Beiggi mín, sum eg tók festið eftir, hevði eisini kálvar til sláturs, og tá ungneytini vórðu dripin, varð alt umbiðið so hvørt, sigur hann.

### Bróðurin slepti

Harry sigur, at teir hava eitt stórt og gott flettingarrúm í fjósinum, sum bæði kann brúkast til slátur av seyði og neytum.

- Vit gera betringar so hvørt, sum møguleikar eru til tess, og málið hjá okkum er at fáa sláturrúmið góðkent sum frálíður